# Frítíðarløn 2. mai 2006

**Frítíðarlønin verður útgoldin 2. mai 2006.**

Eigur tú frítíðarløn, fært tú eina fráboðan.

**Býrt tú í Føroyum**
Ert tú flutt/-ur, síðani tú boðaði fólkayvirlitinum frá, fer fráboðanin retur til Frítíðargrunnin.
Fyri at sleppa undan hesum skalt tú boða **fólkayvirlitinum** frá nýggja bústaðnum.

**Býrt tú uttanlands**
Býrt tú uttanlands, og ert tú flutt/-ur, síðani tú boðaði fólkayvirlitinum frá, fer peningurin eisini retur til Frítíðargrunnin.
Fyri at sleppa undan hesum skalt tú boða **Toll- og Skattstovuni**, ið umsitur Frítíðargrunnin, frá nýggja bústaðnum.

**Kontunummar**
Frítíðarlønin fyri 2006 fer á somu kontu sum í fjør. Vilt tú broyta kontunummarið, verður tú biðin um at boða okkum frá nýggja kontunummarinum.
Hetta kanst tú gera við at útfylla fráboðanina niðanfyri og senda okkum hana í seinasta lagi **18. apríl 2006**. Ella tú kanst útfylla fráboðanina á heimasíðuni www.tollskatt.fo.

Hevur tú spurningar, kanst tú ringja til okkum á telefon 35 26 00.
Vit svara mán. - hós. kl. 9.00 - 15.30, og frí. kl. 9.00 – 15.00

| | |
|---|---|
| P-tal: | |
| Navn: | |
| Bústaður: | |
| Postnr. og bygd/býur: | |
| Peningastovnur: (bert føroyskur) | |
| Kontunummar: | |

_______________, / 2006 _______________
Undirskrift

Fráboðanin skal sendast til: Toll- og Skattstovu Føroya, Suðurøki
Postrúm 69
FO-800 Tvøroyri

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

MASKINMEISTARAFELAGIÐ

## Aðalfundur

Maskinmeistarafelagið hevur ársaðalfund

**leygardagin 8. apríl kl. 14.00**

á Grønlandsvegi 56.

Skrá sambært lógini.

**Nevndin**






## Kunngerð

**Broytingar í almennu byggisamtyktini**

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21.mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 30. mars 2006 samtykti broytingar í byggisamtyktini fyri Nólsoy.

Ætlaða broytingin er, at A-sethúsaøkið verður víðkað eystur ímóti Eggjagerði og norðureftir ímóti Norðuri í Bø. Eitt nýtt I-tjaldingar-/ferðavinnuøki verður lagt út eysturi á Eggjagerði, og E-alment frítíðarøki verður víðkað fram við eggini eystur á Nøvuna.

Broytingin umfatar ein part av matr. nr. 103, 16, 3a, 91a, 56b, 4a, 14, 50c, 13, 41 og 29a, Nólsoy.

Tilfar, sum lýsir ætlaðu broytingina, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum frá 10. apríl til og við 8. mai 2006, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00. Og hongur í svørtutalvu í Nólsoy sama tíðarskeið.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða send Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 10. juli 2006.

**Tórshavnar kommuna**



## Kunngerð

**Broytingar í almennu byggisamtyktini**

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 30. mars 2006 samtykti broytingar í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, at D2-ítróttarøkið við fótbóltsvøllin á Argjum verður víðkað vestureftir við uml. 12.000 m$^2$.

Broytingin umfatar ein part av matr. nr. 4a á Argjum.

Tilfar, sum lýsir ætlaðu broytingina, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum frá 10. apríl til og við 8. mai 2006, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða send Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 10. juli 2006.

**Tórshavnar kommuna**